## VIÐMERKINGAR

# Einskiljing av Atlantsflog

JAN ARABO

Nú sær út til at Atlantsflog skal einskiljast við fyrst at selja ein triðing síðani ein triðing afturat onkuntíð seinri. Hesin háttur er bert ein annar háttur hjá summum fólkafloks ideologum at avreiða Atlantsflog.

Ein orsøk fyri at einskilja Atlansflog eru sambært Bjarna Djurholm millum annað, at Atlantsflog skal einskiljast fyri at verða meira "dynamiskt".

Bjarni man helst ikki vita hvat hetta orð týðir, so eg vil vísa til Gyldendals Dansk Fremmedordbog har millum annað stendur um "dynamisk": "energisk, handlekraftig, virke ved egen kraft".

Dynamikkur hevur sostatt sermekt Atlantsflog leingi.

So Bjarni og aðrir "klókir" menn, vinarliga leggi tykkum í geyma týdningin av orðinum "dynamiskt" áðrenn tit brúka tað.

Poul Michelsen førir fram at Atlantsflog fer á reyvina um ikki tað verður einskilt við 66%. Hetta man verða største tvætlið sum er sagt í ár. Eg veit ikki hvar Poul hevur hetta frá. Kanska tað kemur frá ekstremum fólkafloks ideologium.

Tað er als ikki neyðugt fyri eina fyritøku at verða privat fyri at verða vælrikin. Tað eru góðar treytir, gott umhvørvi, gott fólk sum millum annað gera eina fyritøku vælrikna.

Og her er Atlantsflog eisini væl við.

**Parteigaraavtala**

Onkur hevur rópt upp um, at vit missa Atlantsflog, um vit selja meirilutan. Bjarni Djurholm og aðrir siga, at ein parteigaravtala sum er galdandi í 7 ár skal forða hesum.

Ein parteigaravtala hevur ikki størri virði enn at ein aðalfundur kann broyta hetta. Soleiðis er parteigaravtala ikki verd tað pappírið, hon er skrivað á. Og skuldi tað hent, at avtalan heldur í 7 ár, hvat hendir so aftaná?

Um 7 ár er bert ár 2013. Hetta eru 2 ár áðrenn 2015, og skula vit blaka eitt gott flogsamband og harvið ein part av visión 2015 fyri borð, bert grunda á nøkrum ekstremum fólkafloksideologium?

**Um strategiskan keypara**

Her sær út til at Bjarni og aðrir "klókir" menn heldur ikki rættuliga vita týdningin av "strategiskt" og "strategi".

Enn einaferð vil eg vísa til Gyldendals Dansk Fremmedordbog har millum annað stendur um "strategi": "planlæggelse af fremgangsmåde til at opnå et ønsket resultat".

Til dømis kunna vit ímynda okkum at Icelandair (ella onkur annar) keypir part av Atlantsflog og saman við øðrum hava ein meiriluta. Hesin meiriluti metir kanska, at Atlantsflog fær meira burtur úr at verða meira integrerað í Icelandair og hava høvuðsstøð í Keypmannahavn, London, Keflavík ella aðrastaðni. So skal bert ein aðafundur til og "ups" nú hava vit spælt okkum av við Atlanstflog og vit eru aftur í tíðini áðrenn Atlantsflog, har vit bert hava eitt ella færri flogfar um dagin og kanska bert sum ein millumlending til og úr Keflavík.

Vit mugu minnast til, at Atlantsflog ikki kom fyri at kappast við m. a. Maersk. Atlantsflog kom fyri at arbeiða fyri føroyingar og Føroyar við góðum og stabilum sambandi við umheimin, millum annað í kraft av einum stórum títtleika.

At so kapping eisini kom var eitt eyka pluss.

Tað er av størsta týdningi, at vit hava gott samband við umheimin. Tað verið seg á sjónum og í luftini.

Uttan gott samband við umheimin er tað sama sum at visión 2015 fer í ommu sína.

Eg vóni, at Javnaðarflokkurin og onnur vakna og ikki lata seg lokka av ekstremum fólkafloksideologium sum í besta føri kann blíva til "luftkastellir".

Tí mæli eg frá at lurta eftir Bjarna Djurholm, Poul Michelsen og øðrum "klókum" monnum.

Eg mæli frá at einskilja Atlantsflog.

Lat gott flogsamband við umheimin verða við í visión 2015.

P.S. Ein áheitan til Bjarna og aðrar. Dansk Fremmed Ordbog frá Gyldendal fæst til keyps í bókabúðum og hevur ISBN nummar 87-00-48822-4

# Viðmerking til Katrin og Jóannes

JENIS AV RANA
Løgtingsmaður



Í samrøðu millum Katrin Petersen, journalist, og Jóannes Ejdesgaard, løgman, í Dimmalætting leygardagin, fáa vit innlit í, hvør veitir løgmanni høvuðsíblástur (spindoktari?). Talan er um amerikanskan successrithøvundan Richard Florida, ið m.a. hevur skrivað bókina " den kreative klasse", ið løgmaður vísir til.

Tað er í hesari samrøðu, at løgmaður slær hondina av útjaðaranum, og enn einaferð nýtir høvið til ikki at virða ta Løgting, sum við demokratiskari atkvøðugreiðslu feldi uppskot um broytingar í sokallaðu antidiskriminatiónslógini.

Men tað er ikki so løgið, tí sambart dr. Florida er eyðkenni fyri hesi sonevndu kreativu umhvørvini, sum løgmaður er so eggjaður av, júst eitt sonevnt høgt Gay index.

Fari at loyva mær at spyrja Katrin, í sínum eginleika av journalisti, um hon ikki kann greiða okkum lesarunum frá, hvør hesin spindoktarin, Richard Florida, er. Um alt er so trúvert, ljósareytt og góðkent, sum hann kemur við. Og um teorir hansara so ómakaleyst glíða niður og broyta aðrar leiðarar, sum vit uppliva at tær hava broytt løgmann. Ikki bert tykist hesin hava fingið hugskotið um at geva útjaðaran upp ( les greinina í Dimmu farna leygardag ) beinleiðis frá Mr. Florida, men eisini hugsan sína um at sleppa arbeiðaraklassanum upp á fjall.

Niðanfyri loyvi eg mær stutt at endurgeva smá brot úr viðmerkingum hjá einum av mongum viðmerkjarum, ið bæði síggja vandar, men eisini beinleiðis skeivleikar, í hugsanum Florida's.

*...mit gæt er, at Floridas bøger vil være billigt til salg om få år og fylde godt op i antikvariaternes bogkasser...*

*...kritikere har f.eks. været inde på, at de amerikanske byer, som Florida selv nævner som hjembyer for den kreative klasse, ikke er steder med nævneværdig vækst. Vækst finder man ikke i New York eller San Francisco, men derimod i Detroit og andre ikke særligt hotte ...byer som Reno, Boise, Orlando, Las Vegas og Salt Lake City. De er måske ikke så smarte, men de laver til gengæld gysser og opdyrker nye markeder. Imens har Floridas yndlingsbyer Boston, Chicago og Minneapolis, ja, hele 'Euro-Amerika', faldende vækstrater. F.eks. har eurobyen Seattle samme indbyggertal som i 1960, men nu med halvt så mange børn. Det er den kreative klasses bagside: Den kan ikke få børn...*

*...at bøsser og lesbiske eller 'åbenhed' tilmed skulle være godt for en by – økonomisk – er også tvivlsomt... hvis 'Det åbne samfund' er Floridas mål, kan man frygte for, at han ikke ser dets fjender. At alle i deres iver efter at være kreative og tolerante ser stort på at være produktive. Her er et nyt motto til den 1. maj: Arbejdere i alle lande, slap af! Men er det sådan, vi skaber vækst?...*

Okkara ( Miðfloksins) ráð til løgmann eru annars óbroytt. Lat okkum seta álit á eina heilt aðra bók, og rithøvunda hennara, tá verða vit ikki svikin. Um tað eru dømini margfaldfrá persónum í hópatali, frá bygdar- og býarsamfeløgum og enntá londum. Fái vónandi innivist í einum av komandi bløðum at greiða frá undri sum hendi, tá eitt heilt býarsamfelag valdi at fylgja vegleiðingum Skaparans.

*rana@post.olivant.fo*

# Tað skaðar, tá politiskar loysnir eru opportunistiskar

JÓGVAN VIÐ KELDU
Løgtingsmaður



**Hygg at byrgingini um Haraldssund, sum liggur sum ein skomm av berari politiskari opportunismu.**

Serliga seinastu tíðina hevur kjakið gingið uttan íhald um vegaføringina ígjøgnum Leirvík.

Eg kundi hugsað mær at farið eini stívliga 20 ár aftur í tíðina, tikið dømi um, tá skilaloysi og politisk opportunisma tóku avgerð. Her er talan um tá fasta sambandið um Haraldssund skuldi avgerast.

**Brúgv ella byrging**

Táverandi Landsverkfrøðingurin var fleiri ferðir á fund við m.a. Klaksvíkar Kommunu, har tvinni uppskot lógu á borðinum, nevniliga ein byrging við brúgv og siglingarrennu, alternativt ein byrging við atløgu-síðu norðan fyri byrgingina.

Býráðið tók málið upp. Har var ósemja um málið. Vit vóru tríggir, ið valdu loysnina við byrging og atløgusíðu, sum vit royndu at fáa hinar býráðslimirnar við til, tí henda loysn var fíggjarliga til at lyfta.

**Landspolitikarar, vitskapsfólk og SVF**

Største orsøkin til, at restin av býráðnum ikki tók undir við okkum var helst, at allir fýra landspolitikararnir fyri Norðoyggjar, sum sótu í 1980unum, kravdu byrging við brúgv og siglingarrennu.

Vit sum vóru í einum minnilutabólki saman við Landsverkfrøðinginum, royndu at trýsta eina fíggjarliga gjøgnumførliga loysn ígjøgnum, men síðani komu sterkari kreftir inn, m. a. vitskapsmaðurin, sum álvarsliga í Sjónvarpi Føroya greiddi frá eini botnvending, ið hevði verið á Funningsfirði, sum eisini kundi henda í Klaksvík. – Uppgávan hjá SVF tyktist tá og tykist nú at hava sum mál, at seta fólk upp ímóti hvørjum øðrum, heldur enn at lýsa mál fyri at royna at fáa úrslit.

– Landsverkfrøðingurin – tann kapasitetur hann nú einaferð var – varð settur út sv spælinum, og norðoyatingmenn, saman við vitskapsmanninum vunnu.

Tað er orsøkin til, at byrgingin um Haraldssund enn liggur sum ein skomm.

Har er eingin siglingarrenna komin og hon kemur heldur ikki.

**Opportunistarnir vunnu**

At vera opportunistur sum politikari, gevur helst atkvøður, men vanliga ikki skilagóðar loysnir.

Eg skal ikki koma nærri inn á, allar tær samrøður eg sum borgarstjóri í Klaksvík hevði við skilamenn á sjógvi og á landi í hesum umfari, men ein teirra, sum avgjørt ikki fekk løn, sum umhvørvisvitskapsmaður, skrivaði eina longri frágreiðing, har hann vísti á streymviðurskifti etc., sum fór at gera Klaksvíkina reinari.

Hesin fekk rætt!

**Avskeplaða byrgingin**

Eg havi fleiri ferðir sett fyrispurning til skiftandi landsstýrismenn í vinnumálum, nær vit í øllum førum kunnu rokna við at fáa nýtiliga loysn á byrgingini. Tað hevur higar til dags bara verið tosað burtur.

Hesar verkætlanir – fasta sambandið um Haraldssund og vegaføringin í Leirvík – minna ótrúliga nógv um hvøjra aðra, har opportunistiskir politikarar skulu gera øllum til vildar og soleiðis ongun tilvildar.

Haraldssund liggur eftir 20 árum sum ein skomm við ongari atløgusíðu norðanfyri, ongari brúgv og ongari siglingarrennu, sum okkara landspolitikarar í Norðoyggjum góðu lyfti um. Ólíka var, um opportunisman var løgd til viks og skilagóð avgerð varð tikin.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.




Les Sosialin so ert tú við